REYÐI KROSSUR



# Ársfrágreiðing

# 2019

## Innihaldsyvirlit


**Um Reyða Kross** ..... 5

**Støðulýsing** ..... 6

**Nevnd** ..... 7

**Skrivstova** ..... 7

**Endurnýtsluvirksemið hjá RKF** ..... 8

Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka í Tórshavn ..... 9

Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu í Tórshavn ..... 9

Endurnýtsluhandilin í Vági ..... 10

Klædnainnsavningin og klædnaskiljingin ..... 11

Bókasølan ..... 12

**Tilbúgving** ..... 13

Fyrstahjálpin ..... 14

Ársins Fyrstihjálpari ..... 14

Samarittarnir ..... 16

**Sosialt arbeiði** ..... 17

Vitjanartænastan ..... 17

Klædnahjálpin ..... 19

Samstarv við Barnabata um jólahjálp til barnafamiljur í fátækravága ..... 20

Samstarv við Kvinnuhúsið um at hjálpa kvinnum, sum hava verið raktar av harðskapi ..... 20

Bókagáva til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum og Barnaheimið ..... 20

Integratión ..... 21

ABC fyri sálarliga heilsu ..... 22

Ung í Reyða Krossi ..... 22

**Innsavningar** ..... 24

Filateli ..... 24

Peningakistlar ..... 24

Landsinnsavningin 2019 ..... 24

**Altjóða hjálpararbeiði**......25
Nýggir karmar fyri altjóða hjálpararbeiðið hjá RKF......25
Fundur við leiðsluna í RKÍD......26
Altjóða starvsfólk hjá RKF......26
Kunningarátak um altjóða arbeiðið......26
Kunningarferð......27
**Altjóða neyðhjálp**......29
Etiopia......29
Altjóða katastrofutilbúgvingin (DREF)......31
Bahamas......32
Sýria......33
Mosambik......34
Libanon......35
Bangladesh......36
Malavi......37
Suður Sudan......38
Barnalandið í Malavi......39



# “Sjálvboðin hava ikki altíð góða tíð

# men tey hava hjartað á røttum stað”

*Umsett leystliga eftir Elisabeth Andrew.*
*Úr røðu hjá Mariann Øster, samarittinstruktøri hjá RKF*
*til 20 ára stovningardagin hjá samarittunum.*

## Um Reyða Kross

Reyði Krossur er heimsins størsti humaniteri felagsskapur við 14 mió. føstum sjálvbodnum. Í sambandi við bráðfeingis neyðhjálp og menningarsamstarv økist talið av sjálvbodnum, limum og starvsfólki. Endamálið hjá Reyða Krossi er at verja lív og heilsu, tryggja virðingina fyri menniskjanum, umframt at verja sínámillum semjur, vinalag, samstarv og varandi frið millum øll fólkasløg.

Í einum heimi við alt meira avbyrging, spenningum og valdsmisnýtslu er tað grundleggjandi, at Reyði Krossur virkar fyri teimum virðum og aðalreglum, bæði hjá einstaklingum og felagsskapum, ið tryggja virðing fyri øðrum menniskjum. Harvið mennist grundarlagið fyri samstarvi millum lond, og fólk um at finna loysnir til felags avbjóðingar. Reyði Krossur virkar tí áhaldandi í samljóði við sjey aðalreglur, ið tryggja, at alt virksemið hjá felagsskapinum er: *menniskjasligt, ópartískt, uttanveltað, óheft, sjálvboðið, ein eind og algildugt.*

Hugsjónin handan Reyða Kross sá dagsins ljós í 1859, eftir at Henry Dunant sá ovurstóra tørvin á humaniterari hjálp í orrustuni við Solferino. Í 1863 varð Altjóða Reyða Kross nevndin, ICRC (International Committee of the Red Cross), stovnað, og innan eitt ár høvdu 12 lond skrivað undir hin fyrsta Genevesáttmálan. Hetta var søguliga sæð slóðbrótandi til frama fyri altjóða hjálparararbeiði. Altjóða nevndin arbeiðir í kreppu-, stríðs- og krígsstøðum. Genevesáttmálarnir frá 1949, og fylgiskjøl teirra, geva Altjóða Reyða Kross nevndini heimild til av sínum eintingum at arbeiða í krígsførandi økjum og londum.

Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløg eru í 192 av heimsins londum. Reyði Krossur og Reyði Hálvmáni eru tvey heiti fyri sama felagsskap, og virka tey á innlendisstigi og á altjóða stigi. Reyði Krossur Føroya varð stovnaður 2. apríl 1926 og er eitt sjálvstøðugt felag. Í altjóða samanhangi eru Genevesáttmálarnir frá 1949 heimildargrundarlagið fyri virkseminum hjá Reyða Kross feløgunum, og Reyði Krossur Føroya er í tí høpi partur av Reyða Krossi í Danmark (RKíD).

Altjóða føderatiónin av Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgum, IFRC (International Federation of Red Cross and Red Crescent Societies), var stovnað í 1919. Altjóða føderatiónin er meginfelagið fyri tey 192 tjóðskaparligu feløgini og arbeiðir saman við Altjóða Reyða Kross nevndini, ICRC, og tjóðskaparligu Reyða Kross- og Reyða Hálvmánafeløgunum í sambandi við náttúruvanlukkur og menningarhjálp. Føderatiónin, IFRC, feløgini á tjóðarstigi og Altjóða Reyða Kross nevndin, ICRC, verða í felag nevnd Altjóða Reyða Kross og Reyða Hálvmána Rørslan. Øll hesi eru tvinnað saman við teimum sjey aðalreglunum.

## Støðulýsing

Árið 2019 er ein staðfesting av, at við næstrakærleika og góðum vilja ber tað sannliga til hjá sjálvbodnum at veita munagóða hjálp bæði úti og heima, og at savna pening inn til heimsins veikastu menniskju.

Undanfarna ár var sum heild eitt sera virkið ár fyri Reyða Kross Føroya (RKF). Vitjanartænastan var nógv umbiðin og ment, soleiðis at hon nú virkar í enn fleiri pørtum í landinum. Samarittarnir kundu halda 20 ára stovningardag í august mánað, og vóru til staðar til nógv tiltøk kring landið. í fyrstuhjálpini vórðu nógv skeið skipað, og týðandi tillagingar vórðu gjørdar. Stór undirtøka var fyri landsinnsavningini, og endurnýtsluøkið hevði eitt framúrskarandi gott úrslit, neyðstøddum at frama. Nevndin hittist ofta at viðgera týðandi spurningar, og skrivstovan tryggjaði dygdargóðan og effektivan rakstur.

Størstu íløgurnar í 2019 vóru til altjóða neyðhjálpararbeiðið, sum varð skipað sambært nýggari *Menningarætlan fyri humanitert arbeiði: í Føroyum og úti í heimi, 2018-2020*. Harav var nýggj 4-ára samstarvsavtala gjørd við landsstýrið um altjóða humanitera hjálp, sum tryggjaði, at RKF megnaði at lata heilar kr. 4.698.000.

Sum ársfrágreiðingin vísir, verður mett, at stuðulin frá RKF varð brúktur til lívsneyðugar hjálparveitingar og tænastur kring heimin, og rakk til fleiri enn 216.400 av heimsins veikastu menniskjum.

Harumframt hevur RKF sett eitt altjóða starvsfólk, sum umvegis altjóða deildina hjá RKíD arbeiðir við at veita neyðstøddum kring heimin skjóta og góða hjálp. RKF er sostatt vorðin meira virkin í altjóða humaniterum arbeiði.

Eisini var eitt stórt arbeiði gjørt í Føroyum, eitt nú innan vitjanartænastu, fyrstuhjálp, integratión, mat- og klædnahjálp og annað sosialt arbeiði. Endurnýtsluøkið hevði sítt besta úrslit nakrantíð, og hjálparpakkar vóru gjørdir í samstarvi við Barnabata til frama fyri børn í fátækravága í Føroyum. Eisini byrjaði eitt nýtt samstarv við Kvinnuhúsið um at hjálpa harðskapsraktum kvinnum og børnum. Íløgur vóru gjørdar í fyrstuhjálparøkið, og alneyðugar umbyggingar vóru gjørdar í Stiðjagøtu 6 og á Bryggjubakka 10.

Hóast neyðin framvegis er stór í heiminum, kann árið 2019 sigast at vera væleydnað, og lunnar eru lagdir undir framtíðar hjálpararbeiðið hjá RKF bæði í Føroyum og úti í heimi.

Sjálvbodna arbeiðið, samstarvsfelagar og peningaligir stuðlar eru grundarlagið undir Reyða Krossi, og hava øll hesi hjartaliga tøkk uppiborna.

## Nevnd

Nevndin er evsti myndugleiki hjá Reyða Krossi Føroya, og er mannað við 5 nevndarlimum og 2 varalimum, sum øll eru sjálvboðin. Hvørt virksemisøki hevur ein sjálvbodnan leiðara, umframt at hvørt øki hevur minst ein nevndarlim tilknýttan. í 2019 vóru 11 nevndarfundir hildnir.

## Skrivstova

Skrivstovan hevur ábyrgd av at skipa, reka og menna dagliga virksemið hjá Reyða Krossi Føroya. Tað verður gjørt í samstarvi við nevndina, virksemisleiðarar og sjálvboðin. Skrivstovan hevur dagligu ábyrgdina av virkseminum hjá Reyða Krossi Føroya. Tvey starvsfólk arbeiða á skrivstovuni og eru lønt tilsamans 65 tímar um vikuna, sum tey einastu løntu størvini í Reyða Krossi Føroya.
Hin 1. januar 2019 varð Sigrið Zachariasen sett í fast starv sum samskipari hjá Reyða Krossi. Sigrið arbeiðir við fjølbroyttum uppgávum, og hevur serliga klædnaendurnýtsluna um hendi.

Í 2019 arbeiddi skrivstovan við fylgjandi økjum:

- Rakstur og menning av virksemisøkjunum hjá Reyða Krossi Føroya, t.d. samskifti við sjálvboðin, fíggjarviðurskiftum, kunning, heimasíðuni, sosialum miðlum, lýsingum og at loysa uppgávur saman við sjálvbodnum.

- Samskipan av tiltøkum og verkætlanum, t.d. ársins fyrstuhjálpara, trivnaðartiltøkum fyri sjálvboðin, fundum og landsinnsavningini.

- Hjálpararbeiði innan eitt nú tilbúgving, átøk fyri viðkvæmar bólkar her í Føroyum, familjulegu fyri fólk við tilflytarabakgrund og altjóða neyðhjálp.

- Samstarv sambært nýggju *Menningarætlanini fyri humanitert arbeiði: í Føroyum og úti í heimi 2018-2020* við eitt nú landsstýrið, kommunur, stovnar, danska Reyða Kross, íslendska Reyða Kross, arktisk landsfeløg hjá Reyða Krossi, fyritøkur og felagsskapir.

## Endurnýtsluvirksemið hjá Reyða Krossi

Reyði Krossur Føroya hevur eitt umfatandi endurnýtsluvirksemi, og samanlagt eru eini 95 sjálvboðin í hesum virksemisøki. Klædnainnsavningin savnar inn eina stóra mongd av klæðum í bingjum kring landið, meðan Klædnaskiljingin hjá Reyða Krossi í Stiðjagøtu í Havn skilir klæðini.

Klædnahjálpin hjá Reyða Krossi hjálpir familjum, ið ikki eru so væl fyri fíggjarliga.

Eisini verður í Reyða Krossi tikið ímóti og skilt væl av bókum, frímerkjum og nakað av lutum.

Vit hava fýra endurnýtsluhandlar: Í Tórshavn hava vit eina bókasølu í Vágsbotni og klædna- og lutahandlar á Bryggjubakka, í Stiðjagøtu og í Vági. Harafturat savna vit inn brúkt frímerki.

Endamálið við endurnýtsluvirkseminum er at savna pening til hjálpararbeiði bæði í Føroyum og kring heimin.



## Endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka í Tórshavn

Inntøkan í 2019 var kr. 238.000, sum er áleið tað sama sum í 2018, tá inntøkan var áleið kr. 235.000.

Tað eru umleið 30 kvinnur, ið manna handilin 4 dagar um vikuna, týsdag til fríggjadag kl. 13.30-17.30 umframt mánadagar, har 2 hold á 4-5 kvinnur prísa og heingja klæðir upp. Talið av sjálvbodnum kundi verið nakað hægri.

Myndir verða lagdar út á Facebook bólkin hjá handlinum hvørja viku. Í løtuni eru útvið 2.000 brúkarar, og hetta er ein góður sýnisgluggi hjá okkum. Serliga eru tað tær føroysku troyggjurnar, sum eru væl umtóktar, og verða fleiri av teimum vaskaðar  og umvældar, áðrenn tær fara í handilin. Stór tøkk er uppiborin fyri tað stóra arbeiði, ið verður lagt her.

Reyði Krossur hevur havt endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka síðani 2006. Handilin er skipaður við einum leiðara og tveimum varaleiðarum, og ein sjálvboðin varðar av hvørjum vikudegi sær.

## Endurnýtsluhandilin í Stiðjagøtu í Tórshavn

Inntøkan í 2019 var kr. 974.000, sum er eitt framúrskarandi úrslit í mun til 2017, tá inntøkan var kr. 737.000. Handilin hevur verið væl vitjaður, tað gongur framá við søluni, eins og bæði virksemisleiðari og sjálvboðin hava verið ómetaliga hjálpsom at reka handilin.

Í februar 2019 byrjaðu Irena, virksemisleiðari fyri handlin, og Knút at byggja handilin um. Tey fingu sonin Terja at hjálpa við at taka 2 veggir burtur, tann inn til barnadeildina og tann millum stóra handilsøkið og økið, har skógvarnir standa í dag. Umbyggingin førdi við sær, at tað var smíðað, málað og skipað soleiðis, sum hann í dag sær út. Bæði sjálvboðin og kundar halda, at handilin er vorðin luftigari og at stativini eru komin betur til sín rætt. Hetta arbeiðið var ein gáva til Reyða Kross frá Knúti, Terja og Irenu.

Samstundis var nakað av nýggjum innbúgvi keypt, til dømis nýggjur diskur við innkomuhurðina og nýtt kassatól. Harafturat keyptu vit 4 nýggj stativ, sum standa mitt á gólvinum, og 2 fýrkantað stativ. Smálutir kunnu nú leggjast á hesi stativ, so at tað sær snøgt út.

Síðani var eitt serstakt øki við nýggjum hyllum til skógvar sett upp, soleiðis at allir skógvar nú eru savnaðir á einum øki. Tað tykist, sum at nógv fleiri skógvar verða seldir nú.

Barnadeildin hjá Johonnu hevur eisini havt góða framgongd, ið hevur kravt nógv arbeiði. Sjálvboðin arbeiða eisini í teimum vikunum, har handilin ikki hevur opið. Cathrina kom við í

heyst, og hon hevur arbeitt einar 20 tímar um vikuna, og hevur harvið verið ein sera góð hjálp bæði fyri handilin og ikki minst fyri at lætta um hjá Johonnu.

Arbeitt verður fram ímóti at menna og samansjóða mannagongdirnar fyri allar Reyða Kross handlarnar. Sjálvboðin í handlinum eru sera takksom fyri jólaveitsluna og útferðina til Sandoynna í 2019.

Tað er annars tørvur á sjálvbodnum, sum skulu til fyri at reka handilin, fylla upp, prísa og halda handilin snøggan og innbjóðandi.

Irena steðgar sum virksemisleiðari, og Reyði Krossur takkar henni so hjartaliga fyri ómetaliga góða tænastu í undanfarin ár. Irena fer tó framhaldandi at vera sjálvboðin, og rætta eina hjálpandi hond, har hon orkar.

Í 2019 var handilin opin leygardagar klokkan 10 til 15. Hann selur góð, smart, øðrvísi, kul og lekkur klæðir frá endurnýtsluni hjá Reyða Krossi. Klæðini eru til børn, ung og vaksin.

## Endurnýtsluhandilin í Vági

Í 2019 seldi endurnýtsluhandilin í Vági fyri kr. 37.000. Hetta eru áleið kr. 5.000 minni enn í 2018.

Endurnýtsluhandilin í Vági hevur hildið til í einum góðum handilshøli í bygdini, men verður frá 2020 staðsettur í nýggjum hølum yvir á Gørðunum.

Í 2019 vóru einar 14 sjálvbodnar kvinnur, sum virka í sambandi við endurnýtsluhandilin í Vági.

Handilin var opin fýra dagar um vikuna. Mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 14.00 til 17.30 og leygardag kl. 10.00 til 13.00.

Handilin er skipaður við einum leiðara.

Mánadag og mikudag eru tríggjar til fýra sjálvbodnar kvinnur í handlinum. Fríggjadag og leygardag eru ein til tvær í handlinum. Hetta liggur í fastari skipan.

Tær sjálvbodnu kvinnurnar skilja og strúka eisini klæðir, teir dagarnar handilin er opin. Eisini skipa tær fyri, at kaffi, te og annað verður sponsorerað av privatum fólki og handlum har um leiðir.

Reyða Kross Endurnýtsluhandilin í Suðuroy læt dyrnar upp á sumri í 2011.

## Klædnainnsavningin og klædnaskiljingin

Inntøkan fyri 2019 var áleið kr. 302.000 í mun til í 2018, tá inntøkan var áleið kr. 324.000.

Fyrst í 2019 var útflutningsbingjan flutt av bryggjuni og út í Stiðjagøtu 6. Harvið gjørdist tað lættari hjá sjálvbodnum at takast við klæðini, ið áður skuldu tømast fleiri ferðir í og úr bilinum. Sjálvboðin á økinum halda, at arbeiðið nú er meira hugaligt og eru sera takksom fyri hetta.

Reyði Krossur hevur nú 24 bingjur kring landið: í Klaksvík, Fuglafirði, Saltangará, Miðvági, Vestmanna, Vági, Tórshavn og á Tvøroyri.

Eisini komu 10 nýggjar klædnabingjur úr Týsklandi, og ætlanin er at seta tær upp kring landið.

Nøgdin av klæðum, sum kom inn, var aftur rættiliga stór. Hendan stóra nøgdin av klæðum setti stór krøv til bilførarar og skiljifólk, sum hava gjørt eitt megnar arbeiði seinasta árið. Tørvur er tí á fleiri sjálvbodnum, bæði til vanliga virksemið og til at skipa fyri og menna økið.

Umframt innsavning av endurnýtsluklæðum hava Klædnainnsavningin og Flutningstænastan ábyrgdina av, at innsavnaðu klæðini verða send av landinum eftir skiljingina. Í 2019 vóru 12 bingjur sendar til Týsklands, við uml. 10 tonsum av klæðum í hvørjari.

Onnur ábyrgdarøki í Klædnainnsavningini og Flutningstænastuni eru, millum annað, flutningur millum hølini í Stiðjagøtu og Bryggjubakka, ruskkoyring, viðlíkahald av bilinum, viðlíkahald av bingjunum kring landið og ymiskar aðrar  uppgávur. Tað verða savnaðir næstan 200 sekkir av klæðum um vikuna.

16 sjálvboðin eru virkin í Klædnainnsavningini og Flutningstænastuni, og fleiri sera røsk og dugnalig sjálvboðin løgdust afturat í 2019.

Tá klæðini eru savnað saman, verða tey síðani skild úti í Stiðjagøtu. Klædnaskiljingin er ein stórur partur av endurnýtsluvirkseminum hjá Reyða Krossi. Eini 60 sjálvboðin eru knýtt at hesum virkseminum, og tey eru skipað í bólkar.

Fleiri kvøld í vikuni verða innkomin klæðir skild. Klæðini verða skild soleiðis, at nakað fer í endurnýtsluhandilin á Bryggjubakka, í Stiðjagøtu, til Vágs og til Klædnahjálpina, ið hjálpir fíggjarliga sperdum fólkum, meðan ein partur verður sendur av landinum. Sambært avtalu, sum varð gjørd í mars í 2017, selur Reyði Krossur Føroya endurnýtsluklæðini til Týsklands.

Klædnaskiljingin er skipað við einum yvirskipaðum virksemisleiðara og einum leiðara fyri hvønn skiljibólk.

## Bókasølan

Aftur í ár gekk væl við Bókasøluni. Inn komu áleið kr. 159.000, sum er nakað meir enn í fjør.

Vælvitjaða Reyða Kross Bókasølan í Vágsbotni í Havn er eitt slag av sjálvtøku, har fólk keypa bøkur og gjalda uttan nakað eftirlit. Bókasølan er opin sjey dagar um vikuna.

Bókasølan er skipað við einum leiðara. Átta sjálvboðin eru knýtt at Bókasøluni. Tríggir mans halda dagliga eyguni við Bókasøluni, ið hevur opið allar sjey dagar í vikuni. Teir eru framvið og hyggja, um nakað nýtt er komið, og tá neyðugt er, leggja teir nýggjar bøkur fram. Afturat teimum trimum, ið varða av Bókasøluni, eru eisini átta mans, ið eftir fastari skipan lata upp og læsa morgnar og kvøld.

Hvørt mikukvøld millum kl. 19.00 og 21.00 hittast teir og hava opið. Tá hava fólk høvi at koma við bókum og øðrum. Hetta eina kvøldið í vikuni koma ofta aðrir menn inn á gólvið og fáa ein kaffimunn og eitt prát. Hetta eru serliga menn, ið eru knýttir at Bókasøluni, ella menn, ið fyrr hava verið virknir í Reyða Krossi. So til ber at siga, at hetta mikukvøldið eisini er eitt sosialt mannfólkakvøld í Reyða Krossi.

Í bókasøluni verður greitt soleiðis frá um árið 2019:

*"Einki er nýtt undir sólini", sigur prædikarin. Ikki fyri at bera okkum saman við prædikaran, men úr Bókasøluni eru eingin stórtíðindi at frætta. Eingin gøla - tað sama, tað sama.*
*Vit, nakrir gamlir og hálvgamlir menn, hugna okkum niðri í Vágsbotni. Royna at selja nakrar bøkur. Hittast hvørt mikukvøld, rudda, práta, drekka kaffi og royna at loysa tey stóru verðinsmálini. Tá likamligu evnini ganga undan, so situr tað mesta í mussaskøðinum. Tað vil so vera. 8 menn (javnstøðunevndin hevur ikki verið eftir okkum enn) eru knýttir at Bókasøluni. Summir aktivari enn aðrir. Nakrir, sum hava verið aktivir fyrr, støkka inn á gólvið mikukvøld og fáa sær ein kaffimunn og eitt prát, so vit kunnu siga, at vit hava okkara egnu lítlu, viðvendu vitjanartænastu, har teir gomlu vitja okkum.*
*Vit fáa nógvar bøkur, men minni enn so alt er seljandi. Fólk eiga nógv, eisini bøkur, so tað gerst ikki lættari at selja við tíðini. Fólk vilja hava góðsku.*
*Men nú skulu vit ikki lata so illa at. Árið í fjør var eitt av teimum bestu, so tað er bara gott. Vit royna at halda útreiðslurnar niðri á einum minimum, og endurnýta plastikkposar, pappkassar o.s.fr. So tað verður spennandi at síggja, hvørjar útreiðslur eru fyri árið.*

Bókasølan fær allar bøkurnar ókeypis, og útreiðslurnar eru nærum ongar, tí munar Bókasølan ógvuliga væl í virkseminum í Reyða Krossi. Lýst verður við bókasøluni á facebook.

## Tilbúgving

Reyði Krossur bjóðar hesar tænastur innan tilbúgving: fyrstuhjálparundirvísing, samarittatænastu og hjálparátøk, tá kreppur raka. Eisini verður ljós varpað á týdningin av fyrstuhjálp, við tiltakinum *Ársins fyrstihjálpari*. Sum heild var 2019 eitt gott ár fyri tilbúgvingina.

Sambært nýggju *Menningarætlan fyri humanitert arbeiði: í Føroyum og úti í heimi, 2018-2020* varð eisini arbeitt við at menna karmar og førleikar innan tilbúgvingina hjá Reyða Krossi.

Skrivstovuleiðarin luttók á førleikamennandi skeiði innan tilbúgving hjá RKíD og á venjing saman við arktiskum landsfeløgum í Finlandi. Í arktiska samstarvinum ætla RKíD og Grønlandi ikki at senda umboð til arktiska samstarvið. RKF fer tí eftir ætlan at umboða DRK á hesum øki. Arktiska samstarvið fer eftir ætlan at stuðla undir menningina av tilbúgvingini hjá RKF.

RKF sendi eisini fyri fyrstu fer eitt umboð á Regional Disaster Response Team (RDRT) skeið í 2019. RDRT skipanin er liður í regionalu tilbúgvingini hjá altjóða Reyða Krossi, og hevur til endamáls at skapa karmar og grundarlag fyri samstarvi í regionalum høpi, um vanlukkur raka. Regionala samstarvið fer eftir ætlan at stuðla undir menningina av tilbúgvingini hjá RKF. RKF og DRK hava avtalu um, at RKF eftir tørvi kann samstarva við onnur landsfeløg um førleikamenning, eitt nú innan tilbúgving. Arbeitt verður við at skilmarka karmarnar fyri hesi skipan.

Harumframt fór RKF undir at skipa fyri einari váðameting fyri Føroyar, ið eftir ætlan skal brúkast til at skipa og menna hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi Føroya í Føroyum. Harvið er ætlanin at økja trygdina í landinum við at lýsa humaniterar váðar í føroyska samfelagnum: hvørjir samfelagsborgarar eru í størsta váða, hvørjar førleikar hevur føroyska samfelagið at standa ímóti kreppum (mótstøðuføri/resilience), og hvørjir førleikar eru at loysa hesar avbjóðingar. Á leið 30 serfrøðingar innan tilbúgving og sosialt arbeiði í Føroyum vóru við í kvalitativu kanningini, ein væleydnað spurnarkanning varð skipað, og eftir ætlan verða skriviborðsvenjingar í 2020. Betri Stuðulsgrunnurin stuðlaði Reyða Krossi við kr. 200.000 til hesa verkætlan, ið verður skipað sambært einum altjóða leisti, sum Reyði Krossur brúkar um allan heim.

Enn einaferð hevur stuðulin frá Betri hjálpt Reyða Krossi at skipa og menna virksemið sítt, soleiðis at Reyði Krossur á dygdargóðan hátt eisini fær skipað humanitert hjálpararbeiði í Føroyum.

## Fyrstahjálpin

Í 2019 hevði fyrstahjálpin kr. 74.000 í inntøku. Hetta er áleið kr. 4.000 minni enn í fjør, tá inntøkan var kr. 78.000. Tilsamans fingu 209 fólk prógv frá Reyða Krossi í 2019.

Líkt er til, at samfelagið gerst alt meira tilvitað um týdningin av, at so nógv sum gjørligt hava grundleggjandi fyrstuhjálparskeið. Serliga sæst hetta við tað, at fyritøkur vísa áhuga fyri at geva sínum starvsfólkum skeið í fyrstuhjálp. Mest eftirspurt var skeiðið í hjartasteðgi og nýtslu av AED (hjartastartara).

Tað eru nógv talandi dømi um, at tá okkurt hendir onkrum, so er tað rættiliga avgerandi fyri, um lívið kann bjargast, at fólk við grundleggjandi førleikum kunnu taka sær av tí skadda.

Tað er eyðsýnt, at júst hetta virksemisøkið kann økjast munandi, eisini tí, at vit eru í samráðingum við stovnar og fyritøkur um at bjóða út fyrstuhjálparskeið.

Hetta setur so eisini Reyða Krossi krøv um, at vit fáa fleiri instruktørar, enn vit hava í dag. Avgjørt varð at søkja eftir fyrstuhjálparinstuktørum. Áhugin fyri hesum var stórur, og fleiri umsóknir komu inn. Tveir umsøkjarar vórðu valdir út, og vóru teir sendir á skeið í januar 2019. Við tveimum nýggjum instruktørum vóna og vænta vit, at tað fer at bera betri til at tillaga okkum til ynskini hjá fyritøkum og stovnum um at fáa undirvísing í vanligari arbeiðstíð.

## Ársins Fyrstihjálpari

Inn komu 15 uppskot, og metingarnevndin meldaði út, at tað varð torført at meta um hvørji uppskot skuldu innstillast. Metingarnevndin, Frank Jacobsen (undirvísari og virksemisleiðari), Tórgerð Jallgrímsdóttir (undirvísari), Joan Hovgaard (undirvísari) og Hans Jákup Simonsen (ábyrgdarlækni) gjørdu hesar tilnevningar, sum fingu heiðursgávur, ið vórðu stuðlaðar av Betri:



**1. Pláss** Beinta Virgarsdóttir, Linda Kjærbo-Veyhe, Jákup Petur Joensen og Allan Jacobsen

Fríggjadagin hin 27. desember 2019 fekk ein 53-ára gamal maður ein hjartatilburð í bili sínum í Vági. Tilnevndu persónarnir, ið vóru nærhendis, komu beinan vegin manninum til hjálpar. Tað vísti seg, at maðurin hevði hjartasteðg.

Tey bóru skjótt at, fingu mannin úr bilinum, hóast bilurin var læstur, og byrjaðu beinan vegin

lívbjargandi fyrstuhjálp, samstundis sum tann eini persónurin boðaði alarmsentralinum frá og fekk útvegað hjartastartara, ið var nærhendis.

Hildið varð áfram við lívbjargandi fyrstuhjálp, til sjúkrabilurin kom á staðið. Hendan fyrsta hjálpin, sum tilnevndu persónar góvu, bjargaði lívinum á manninum.

**2. Pláss:** Pauli Justinussen

Pauli útinti lívbjargandi fyrstuhjálp, tá unnusta hansara Arnbjørg Tórbjarnardóttir small um, við hjartastoppi á arbeiðsplássi sínum "Gloym meg ei" í Klaksvík, har hon arbeiðir sum stuðul. Arnbjørg gjørdist illa fyri, meðan hon var til arbeiðis, og tí gjørdi hon av at ringja eftir Paula, at biða hann koma at heinta seg, tí hon metti ikki, at hon var nóg væl fyri til at koyra heim til Skála sjálv.

Pauli, sum av tilvild var eitt ørindi í Klaksvík, gjørdi skjótt av, og fór at heinta hana. Tá hann parkerar bilin uttanfyri arbeiðsplássið hjá Arnbjørg, kemur róp í, og hann skundar sær inn, og finnur unnustu sína Arnbjørg, sum er smollin um við hjartasteðgi. Hann fer beint í gongd vid lívbjargandi fyrstuhjálp og heldur á fram við hesum, til sjúkrabilur kemur á staðið, og portørarnir taka yvir.

Tað er nokk einki at ivast í, at Pauli eigur ein stóran part av lívinum hjá unnustuni Arnbjørg. Hann bar skjótt at og visti akkurát, hvat hann skuldi gera.

**3. Pláss:** Rasmus Heinesen og Heri Peturson

Tann 31. oktobur 2019, spældi Jógvan Anfinn (Jógvan) við Rasmus og Hera. Teir eru allir 9 ár og ganga í 3 flokki í Leirvíkar skúla. Teir spæla saman í Norðragøtu, hjá Rasmusi. Pápi Rasmus hevði verið á flotið, so teir 3 vilja oman á keiina at heilsa uppá og vita, um hann hevði fangað nakað. Mamma Rasmus gevur teimum bjargingarvest á, sigur við teir, at teir sleppa ikki oman á keiina uttan bjargingarvest. Teir fara oman á keiina í vestum.

Teir spæla í bátinum hjá pápa Rasmus eina løtu. Jógvan tekur sín bjargingarvest av, men pápin hjá Rasmus biður hann fara í vestin aftur. Jógvan so ger.

Pápi Rasmus kryvur fiskar longri uppi á keiini. Teir 3 dreingirnir fara so aftur uppá keiina at spæla, og tá fer Jógvan so aftur úr bjargingarvestinum, tí hann vist ætlar sær heim. Jógvan gongur á einum træplanka, sum er fastur við kajkantin, er áhaldsin, glíður og dettur tí á sjógv, ímillum tveir bátar. Fyrst langar hann armarnar og so høvdið í tann gula bátin. Jógvan er nú í ongum vesti, keiin er høg og eingin stigi er í nánd.

Rasmus og Heri biðja hann svimja yvir móti einum báti, sum liggur har. Rasmus er kvikur og rennur yvir til bátin og loypur niður í hann í einum, toyggir seg út yvir lúnningina og fær so fatur á Jógvani og heldur í arminum á honum alla tíðina, meðan Heri rennur niðan eftir keiini og rópar eftir hjálp.

Heri hevði rópt so hart og rennur niðan á keiina, at menn vakna og hoyra standin. 5 fólk eru kvik at reagera. Teir fyrstu, sum komu oman, vóru Egil Olsen og Hanus Lervig. Teir leypa í bátin og mugu báðir hála hann upp, tí Jógvan var blivin so tungur. Egil letur Jógvan úr jakkanum beinanvegin, tí hann var so tungur. Teir hjálpa honum upp á keiina, og Egil koyrir Jógvan heim. Egil rósar Jógvani alla tíðina og sigur, hvussu raskur hann var.

Hetta kvøldið var Jógvan heppin at hava so góðar vinir: Rasmus sum ikki vildi sleppa arminum á honum, men helt alt tað hann orkaði, til hjálpin kom fram, og Heri sum rann eftir hjálp.

Hesir báðir knassar, Rasmus og Heri, hava uppiborið eitt stórt herðaklapp fyri teirra kvika máta at reagera uppá.

Og moralurin í hesari søgu er so eisini at minnast til, hvussu týdningarmikið tað er at hava bjargingarvest á, tá man er á keiini.

## Samarittarnir

Samarittarnir høvdu kr. 230.000 í inntøku í 2019, ið er ein stór øking frá 2018, tá inntøkan var kr. 155.000.



Tað hevur verið rættiliga støðugt við fólki, og samarittarnir hava havt uml. 1800 vakttímar gjøgnum summarið á 19 vaktum við tilsamans 500 viðgerðum.

Tilgongdin við nýggjum fólki hevur verið stór, og væntandi fáa vit útbúgvið 10-12 næmingar í mars 2020.

Eisini hava vit fingið útbúgvið 7 viðgerðar.

6 samarittar vóru í Danmark til Jelling Musikfestival fyri at fáa meiri og fleir royndir. Til samanberingar kann nevnast, at í Jelling fáa tey uml. 1500 viðgerðir um vikuskiftið, tá festivalurin er, í mun til tær uml. 500 gjøgnum alt árið í Føroyum.

Hølisviðurskiftini eru eisini góð, nú samarittarnir hava fingið stór og góð høli úti í Stiðjagøtu. Tó mangla vit at fáa uppdaterað nøkur ting, so sjálv undirvísingin gongur betur. Hetta verður gjørt í næstum.



20 ára stovningardagurin fyri Samarittarnar var hátíðarhildin síðst august. Nógv fólk, m.a. nøkur av teimum, sum vóru við til at stovna samarittarnar fyri 20 árum síðan, vóru og heilsaðu upp á. Eisini vóru fleiri heilsanir umvegis internetið, m.a. eitt video frá samarittum úr Give. Hátíðarhaldið var fíggjað við stuðli frá Christian í Grótinum.

Harumframt hevur Betri Stuðulsgrunnurin gjørt eina 3-ára stuðulsavtalu við samarittarnar. Stuðulsavtalan við Betri er ein ovurstór hjálp til samarittøkið. Sjálvboðin eru sera fegin um stuðulin, og bæði Betri og Christian í Grótinum hava uppiborið eina hjartans tøkk.

Framtíðin fyri samarittarnar sær bjørt út í løtuni, og sjálvboðin gleða seg til 2020.

## Sosialt arbeiði

Reyði Krossur hevur eina røð av hjálpartænastum innan sosiala økið: vitjanartænastu, mat- og klæðnahjálp og bókagávur til børn kring landið. Integratiónsøkið hevur sambinding/intertwining og familjulegu fyri tilflytarar, og arbeitt verður við nýggjum virksemisøki, *Familjuvinir*, sum er eitt netverk fyri tilflytarar. Eisini er Reyði Krossur partur av verkætlanini *ABC fyri sálarliga heilsu*, og í 2019 vórðu hjálparpakkar gjørdir í samstarvi við Barnabata til tess at hjálpa barnafamiljum í fátækravága, og í samstarvi við Kvinnuhúsið, sum arbeiðir við at hjálpa kvinnum og børnum, ið eru harðskapsrakt.

### Vitjanartænastan

Áleið 60 vitjanarvinir eru kring landið, og teir vitjaðu tilsamans í uml. 1500 tímar í 2019. Hetta er eitt sindur meira enn árið frammanundan, tá talið var 1252. Vitjanartænastan hjá Reyða Krossi hevur ongar fastar inntøkur, og útreiðslurnar vóru tilsamans kr. 3.200.

Í Tórshavn eru nú yvir 30 vitjanarvinir. Nøkur eru farin frá og onnur komin til, so nú hava vit 31 fólk. Kring landið eru fleiri nýggir vitjanarvinir nú virknir.

Reyði Krossur hevur vitjanarvinir á sambýlunum Oman Mattalág og Vallalíð. Eisini hava vit vitjanarvinir á Boðanesheiminum, Tjarnagarði og Lágargarð og heima hjá fólki. Vit hava Undirhús á Boðanesheiminum og á Lágargarði. Harumframt hava vit fólk, sum lesa upp á

røktarheimum og sambýlum.

Tann 10. apríl vóru umboð frá vitjanartænastuni í Klaksvík, har Norðoya Vitjanartænasta varð sett á stovn. Uml. 14 nýggir vitjanarvinir eru nú virknir í Norðoyggjum, og teir eru hjartaliga vælkomir í felagsskap okkara. Faldarar vóru eisini gjørdir við mynd og kontaktpersónum úr Norðoyggjum.

Útferð til Sandoynna varð skipað fyri sjálvbodnum frá Reyða Krossi í mai mánað. Áleið 70 sjálvboðin luttóku, og hetta var ein frálíkur túrur.

Vit fingu vitjan av 19 sjálvbodnum frá *Rauða Krossinn* í Reykjavík 15. mai. Farið var út á Boðanesheimið at heilsa uppá starvsfólk og búfólk, har tey bjóðaðu frugt og kaffi v.m. Eisini varð vitjað í handlinum hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka og í Mettustovu.

*Heilræðið* við Elisabeth Guttesen bjóðaði vitjunartænastuni at koma í Finsen og greiða frá okkara arbeiði í vitjanartænastuni fyri pensionistum, sum vóru fyltir 75 ár í árinum.

Heilsu –og umsorgartænastan hjá Tórshavnar Kommunu bjóðaði øllum vitjanarvinum til døgurða í Posthúskjallaranum í september sum eina tøkk fyri, at tey geva sær stundir at vitja eldri borgarar í kommununi. Har varð millum annað sagt um vitjanarvinirnar: "Tykkara íkast gevur teim eldru borgarum í heimi og á stovni í kommununi góðar upplivingar og góðar løtur, ið tey gleða seg til." Heilsu- og umsorgartænastan vildi fegin vísa takksemi fyri leiklutin hjá vitjanarvinunum.

Borgarstjórin á Nesi Johannus Danielsen bjóðaði til fundar um vitjanartænastuna, sum hann vildi vita meira um. Alfred Olsen, formaður í pensionistafelagnum var við, umframt at Annfríð Neslíð tørvsmeti/visitator á Skálafjørðinum og Eigil Andersen, sum hevði tikið hugskotið upp við borgarstjóran, vóru við á fundinum. Vitjanartænastan er nú sett á stovn í økinum.

Umboð frá vitjanartænastuni vóru við, tá Reyði Krossur Føroya fekk vitjan frá *Røde Kors* í Stavanger. Nøkur av teimun hjálptu fyrrverandi fangum upp á rætt kjøl aftur, við kveikjandi átøkum, so tey kundu koma víðari eftir at hava verið í fongsli. Eitt dømi var, at tey umvældu og málaðu gomul akfør.

Arbeitt verður áhaldandi við at økja um samstarv við stovnar og kommunur kring landið.

Hendan setningin hava vit fingið frá okkara vitjanarvini á Lágargarði:
*Eina løtu einaferð um vikuna. Løtan eg og makin brúka eina ferð um vikuna at vitja ein fittan vitjunarmóttakara er sera gevandi. Man blívur glaður heilt inn á hjarta at síggja gleðina í hansara andliti, tá vit koma. Løtan har hann nýtur at fáa vitjan av okkum, har hann veit at í dag sleppur hann út ein túr. Á okkara biltúrum fáa vit nógv at vita, um tey ymsu støðini í býnum, ið vit ikki kendu søguna um. Látur og góðar søgur, ella vit sita heima og hava eitt hugnaligt prát,*

*og fáa okkum ein góðan kaffimunn. Fyrsta túrin vit vóru, var tað fyrsta hann segði. "Sum hettar er fantastiskt, eg havi ikki veri úti í meira enn 1 ár". So um tú hevur hug at gleða eitt eldri fólk, kanst tú melda teg til sum vitjunarvin hjá Reyða Krossi. Tað eru fleiri, ið kundu hugsað sær eina vitjan. Eg lovi tær, tað er ein sera vælgivin løta, ið tú gevur einum eldri fólki.*

## Klædnahjálpin

Klædnahjálpin hjá Reyða Krossi hevur verið nógv meira virkin í 2019 enn undanfarin ár. Tilsamans fingu 145 børn klæðir frá Klædnahjálpini. 49 av teimum fingu klæðir tvær ella fleiri ferðir í 2019. 6 børn fingu bráðfeingis klædnahjálp. Harumframt vóru fleiri vaksin, ið eisini fingu hjálp. Við góðum stuðulsavtalum við fyritøkur, kostaði hetta Reyða Krossi kr. 49.000.

Reyða Kross Klædnahjálpin varð sett á stovn tíðliga á vári 2013. Fýra sjálvboðin eru virkin í bólkinum. Reyða Kross Klædnahjálpin er skipað við einum virksemisleiðara og varaleiðara.

Klædnahjálpin veitir góð barnaklæðir frá klædnaskiljing okkara, til familjur í Føroyum, sum eru fíggjarliga illa fyri og hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Hetta eru barnafamiljur, har foreldur eru lesandi, ella familjur, ið eru raktar av sjúku og/ella av ymiskum sosialum trupulleikum. Klædnahjálpin fær nógv góð klæðir, ið verða latin Klædnahjálpini beinleiðis og eru eyðmerkt at lata í Føroyum. Harafturat senda hjartagóðar kvinnur okkum nýbundin pløgg, serliga troyggjur, húgvur og hosur at geva børnunum.

Vit ynskja, at foreldrini seta seg beinleiðis í samband við okkum og kanska eisini umvegis onnur - tað kunnu vera næstringar, heilsusystrar, læknar, jarðarmøður, lærarar og onnur góð fólk. Á henda hátt meta vit, at vit betur røkka teimum, sum eru ringast fyri.

Aftur í 2019 lýsti Reyði Krossur við Klædnahjálpini í *Jólahjálpini* hjá Barnabata.

Reyða Kross Klædnahjálpin samstarvar við Herbergið og Frælsið, soleiðis at teirra brúkarar fáa góð klæðir og seingjarklæðir, eins og Kvinnuhúsið verður hjálpt við bráðfeingis klædnahjálp, tá tørvur er á hesum.

Í sambandi við hjálpina til Herbergið eru fleiri kvinnur, sum binda húgvur og hosur til brúkararnar.

Vit lýsa við Klædnahjálpini á okkara egnu heimasíðu, á fleiri øðrum viðkomandi heimasíðum og í bólkum á Facebook.

Í desember var Vibeke á fundi við nevndina, og greiddi frá einari skipan fyri Mathjálp. Vibeke hevði fingið rundvísing á slíkari skipan í Álandi, sum veitir ókeypis mat til neyðstødd. Hetta var ein áhugaverd framløga, og eftir ætlan fer RKF at bjóða mathjálp í 2020.

## Samstarv við Barnabata um jólahjálp til barnafamiljur í fátækravága

Sum eitt nýtt átak var samstarv millum Reyða Kross og Barnabata skipað til frama fyri barnafamiljur, sum liva undir trongum fíggjarligum korum. Til hetta endamál lat Reyði Krossur kr. 200.000, og hesin peningur varð latin sum gávukort til tær familjur, ið fáa jólahjálp frá Barnabata.

Familjurnar søkja um jólahjálp, og umsóknirnar verða síðani viðgjørdar sambært skipaðum og góðkendum leisti.

Tíverri eru nógvar barnafamiljur, ið hava torført við at fáa endarnar at røkka saman, og tað gleðir okkum, at vit kunnu veita eina hjálpandi hond. Hóast felagsskapirnir báðir hava ymiskar endamálsorðingar, er hjálpin til barnafamiljur av felags áhuga.

## Samstarv við Kvinnuhúsið um at hjálpa kvinnum, sum hava verið raktar av harðskapi

Í samsvari við meginreglur og endamálsorðingar hjá feløgunum báðum, eru Kvinnuhúsið og Reyði Krossur Føroya farin undir eitt samstarv um at hjálpa kvinnum og børnum í Føroyum, sum hava verið rakt av harðskapi.

Hetta verður gjørt við at bjóða viðkomandi útbúgving til sjálvboðin og starvsfólk, ið dagliga hjálpa harðskapsraktum, og við at stuðla harðskapsraktum kvinnum við børnum við neyðugari útbúgving, útgerð og, eftir tørvi, við øðrum tilboðum.

Arbeiðið var sett í gongd við árslok 2019, og heldur eftir ætlan fram komandi tíðina.

## Bókagáva til Barnadeildina á Landssjúkrahúsinum og Barnaheimið

Aftur í ár vóru vit runt við bókum til ymisk pláss, har børn eru. Reyði Krossur hevur í fleiri ár latið bókahjálp til børn í desember, og 17. desember vóru vit fyrst á Barna-og Ungdómspsykiatriini P20, og á Barna- og Ungdómspsykiatriskari Dagdeild P30. Síðani fóru vit framvið á Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum, har eisini okkara jólamaður var til staðar. Sum nakað nýtt vóru vit á Barnaheiminum, har starvsfólkini høvdu frætt um okkara bókahjálp og fegin vildu hava bøkur til børnini, sum eru á Barnaheiminum.

Leiðarin av bókasøluni hjá Reyða Krossi savnar gjøgnum árið bøkur til børn og ung millum 3 og 18 ár til Bókahjálpina, og vit lata á leið 30 bøkur hvørt stað.

Allastaðni har vit komu, vóru starvsfólkini sera glað fyri vitjanina og fyri bøkurnar, og tað ljóðar, at bøkurnar koma serstakliga væl við í tí dagliga arbeiðinum og í arbeiðinum við menningini av børnunum.

## Integratión

Seinnu árini eru altsamt fleiri tilflytarar komnir til Føroya, og fleiri teirra koma úr londum uttanfyri ES. Reyða Krossur Føroya ynskir at hjálpa við at fremja integratiónina fyri okkara nýggju borgarar.

Í 2015 arbeiddi Reyði Krossur saman við tiltakinum "Hvussu kunnu vit hjálpa" við at fyriskipa, hvussu vit seta í gongd integratiónsarbeiði í Føroyum, og úrslitið gjørdist Sambinding, á enskum Intertwining. Luttøkan á tiltøkunum var skiftandi, til nøkur tiltøk møttu fleiri, til onnur færri. Ætlanin er tí at gera meira við hetta økið, tí enn er stórur tørvur á tilboðum til tilflytarar í Føroyum. Flestu tiltøkini vórðu hildin á Býarbókasavninum í Tórshavn, men ynskiligt hevði verið, um fleiri tiltøk vórðu hildin uttanfyri høvuðsstaðin.

Endamálið við sambinding/intertwining er at fremja integratión við at skapa ein møguleika fyri, at tilflytarar og 'innføddir' føroyingar hittast til hugna, prát og samveru.

Reyði Krossur skipaði aftur í 2019 fyri einari familjulegu, ið var ætlað fólki við tilflytarabakgrund. Legan varð hildin 4.-6. oktober í Nesvík, og varð sera væl eydnað. 31 familjur, 12 sjálvboðin og 2 starvsfólk frá Reyða Krossi luttóku á leguni. Tilsamans vórðu sostatt áleið 128 fólk til leguna. Umframt hugnaløtur og undirhald, varpaði legan ljós á avbjóðingar, ið fólk við tilflytarabakgrund hava, tá tey flyta til Føroya. Myndir frá leguni kunnu síggjast á facebook vanganum hjá Reyða Krossi.

## ABC fyri sálarliga heilsu

Í samstarvi við Fólkaheilsuráðið og aðrar stovnar og felagsskapir í Føroyum er Reyði Krossur Føroya vorðin partur av verkætlanini *ABC fyri sálarliga heilsu*. Hendan verkætlanin er tann fyrsta universella ætlanin, ið vil siga, at hon er ætlað øllum íbúgvum í landinum. Endamálið er at *fremja sálarliga heilsu manna millum*.

Higartil er hetta tað fyrsta átakið, sum bæði er grundað á gransking, er burðardygt og hevur víst seg at verið møguligt at seta í verk og breiða út í stórum máti. Gransking vísir, at sálarlig heilsa verður styrkt og hildin við líka, við at einstaklingar eru virknir og luttaka í felagsskapi og kenna, at lívið gevur meining. Hetta er sera viðkomandi fyri virksemið hjá Reyða Krossi Føroya.

Endamálið við ABC verkætlanini er:

1) At eggja fólki til at gera eitthvørt fyri at styrkja sálarligu heilsuna hjá sær sjálvum og øðrum.
2) At tryggja góð kor fyri sálarligari heilsufremjan við at leggja dent á karmarnar rundanum.

Við støði í stuðulsavtaluni millum Betri Stuðul og Reyða Kross frá 2018 verður framvegis arbeitt við at skapa trivnað í Reyða Krossi Føroya, bæði innanhýsis og úteftir. Arbeitt verður við at leggja ABC verkætlanina í fasta legu í Reyða Krossi, soleiðis at tvey afturvendandi trivnaðartiltøk verða hildin fyri sjálvboðnum hvørt ár: ein útferð um summarið og ein jólahugni. Hesi tiltøk verða skipað við virðing fyri øllum sjálvboðnum hjá Reyða Krossi, sum árið runt stríðast fyri at hjálpa øðrum, bæði her í Føroyum og úti í heimi.

Vitjanartænastan var virkin í samstarvsfundum innan ABC verkætlanina, og tann 12. apríl bjóðaði Tórshavnar Kommuna til samstarvsarbeiði við gonguvinir til eldri borgarar í kommununi. Tann 24. mai skipaði kommunan fyri Rørslufagnaði á Gundadalsvøllinum, og vit vóru boðin at verða við og hava ein bás um vitjanartænastuna.

Miðstova á Lágargarði vil fegin hava gonguvinir til búfólk við koyristóli, sum ynskja at koma út. Tórshavnar Kommuna bjóðaði umboðum frá vitjanartænastuni á kveikjandi fund "Hvussu skapa aldrandi eitt gott lív saman". ABC fyri sálarliga heilsu er eitt heilsufremjandi átak, sum eggjar fólki at verja og fremja sálarligu heilsuna hjá sær sjálvum og øðrum.

## Ung í Reyða Krossi

Nógv ung eru virkin innan tey ymisku virksemisøkini hjá Reyða Krossi. Í 2019 varð arbeitt við at varpa ljós á teir møguleikar, ið eisini ung hava at gera mun fyri onnur, bæði í Føroyum og kring heimin.

Í samstarvi við RKíD sendi Reyði Krossur Føroya Heiðrun Hammer Erlingsson á kunningarferð hjá Reyða Krossi í Libanon. Heiðrun hevði eina ógloymandi ferð, og hevði fleiri sera áhugaverdar framløgur og samrøður við miðlarnar um ferðina, tá hon kom heimaftur til Føroya.

Eftir ferðina greiddi Heiðrun soleiðis frá:

*Fyrst í august var eg so heppin at sleppa sum sjálvboðin til Libanon saman við Reyða Krossi at síggja hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi í økinum. Í hesi lítlu vikuni upplivdi eg eina rúgvu, bæði av góðum og av ringum.*

*Libanon er eitt lítið land á stødd við Jylland, tó við heili 6 milliónum íbúgvum. Av hesum 6 milliónum er 1/3 flóttafólk. Hesi flóttafólk eru í høvuðsheitum Sýrar, ið eru flýddir frá borgarakríggi í teirra heimlandi.*



*Tað hevur verði fantastiskt at lært hesi fólk at kenna. Vit brúktu meginpartin av ferðini á teimum ymisku flóttafólkalegunum í Libanon. Alllastaðni vit fóru vóru vit møtt við gestablídni og kærleika, bæði frá børnum og vaksnum. Børnini vóru serstakliga fegin at fáa vitjan. Tey vóru forvitin at vita hvaðani vit komu, og hvat vit gjørdu "heima" hjá teimum. Tey komu rennandi yvir til okkum og spurdu um vit tímdu at spæla. Vit brúktu nógva tíð saman við børnunum, meðan tey lærdu okkum nógv ymisk spøl og ramsur frá teirra barndómi í Sýria. Tað var fantastiskt at hoyra um teirra dreymar. Tey vóru sera ivrig at fortelja okkum hvat tey vildu vera, tá tey blivu stór. Tey mest vanligu svørini vit fingu vóru "Politi", "Hárfríðkari" og "Sangari".*

*Men samstundis sum tað var eitt sera gott upplivilsi at møta hesum børnum, so var tað eisini ógvuliga ringt at skilja alt tað, ið tey høvdu upplivað í teirra stutta lívi. Nógv teirra hava mist foreldur, systkin ella vinir undir krígnum, og enn fleiri teirra liva við sálarligum avleiðingum av at hava vitnað so nógvan ræðuleika á einum so ungum aldri.*

*Vit brúktu eisini nógva tíð inni hjá foreldrum teirra. Tey vóru sera blíð og altíð klár at fortelja um lív teirra og hjálpa okkum at skilja hesa truplu støðu. Inni í hvørjum einasta húsi vit komu í, fingu vit bjóðað okkurt til matna ella ein vatnsopa. Tað var ógvuliga rørandi at vera møtt við so nógvum gestablídni frá fólki, ið annars hava so lítið um hendi.*

*Tær samrøður, ið vit høvdu, varpaðu veruliga ljós á tann veruleikan, ið so nógv menniskju liva í. Samstundis var tað eisini flott at síggja, hvussu viljasterkar hesar familjur eru. Teirra størsti*

*dreymur var, at børn teirra kunnu fáa eina virðiliga útbúgving, soleiðis at tey ein dag sjálvi kunnu gerast sjálvbjarging og kunnu hjálpa øðrum í neyð.*

*Enn er ein langur vegur til at vit fáa loyst hendan stóra trupulleikan, og ein langur vegur til, at hesi menniskju aftur kunnu fáa eitt virðiligt lív í tryggleika. Reyði Krossur arbeiðir hvønn dag við at hjálpa hesum fólkum til ein betri gerandisdag. Hetta inniber alt frá at veita mat og drekka til sálarliga hjálp. Nógvar eldsálir brúka alla teirra tíð og orku sum sjálvboðin, at hjálpa medmenniskjum, ið hava stóran tørv á tí. Vónandi gerst talið av hesum eldsálum størri, tí tað er ongin ivi um, at stórur tørvur er á tí.*

*Hóast vit liggja langt burturi, ber tíbetur eisini til at hjálpa her í Føroyum. Eitt nú ber til at gerast innsavnari til landsinnsavningina, har mann gongur við bússum frá húsi til hús at savna inn pening. Tað tekur áleið 2 tímar og innkomni peningurin verður brúktur til hjálpararbeiðið antin úti í heimi og her í Føroyum. Í ár fáa 4 innsavnarar enntá gávubræv á kr. 2000 frá Atlantic Airways.*

## Innsavningar

Reyði Krossur skipar fyri hesum innsavningum, til frama fyri heimsins veikastu menniskju: frímerkjainnsavningin/filateli, peningakistlar, landsinnsavning. Árið 2019 gekk sum heild sera væl fyri innsavningarnar.

### Filateli

Hendan inntøka sær út til at vera minkandi. Tal av brøvum er fallandi og harvið eisini frímerkini. Tilfarið sum kemur inn, verður klippt og sent niður til uppboðssølu. Inntøkan fyri 2019 var áleið kr. 4.000.

### Peningakistlar

Ein peningakistil er á flogvøllinum, og ein er nú hjá Visit Tórshavn í Steinatúni. Kistilin á flogvøllinum varð ikki tømdur fyrr enn í januar 2020 og har vóru áleið kr. 5.300 í. Kistilin í Steinatúni varð tømdur á heysti 2019 og har vóru áleið 10.000 kr. í.

### Landsinnsavningin 2019

Innsavningin varð hildin leygardagin 7. september. Inn komu kr. 903.000, harav kr. 770.000 var frá bússunum. Restin var stuðul beinleiðis frá fólki, fyritøkum og á heimasíðuni hjá Reyða Krossi, umvegis tlf. 905656 ella umvegis sms til 1910.
Runt um í landinum eru nógv ábyrgdarfólk, ið taka sær av einum øki, og tilsamans gingu uml. 400 fólk við bússum. Hetta fegnast felagsskapurin stórliga um, og takkar hjartaliga føroyingum fyri stuðulin, og takkar teimum mongu, sum gingu hús úr húsi við bússum. Hetta svarar til, at hvør føroyingur lat á leið kr. 18,00, og er hetta væl meira fyri hvønn íbúgva enn í øðrum londum.

Í nevndini fyri landsinnsavningina vóru 5 fólk, men eisini hava vit fingið góða hjálp frá skrivstovuni. Nevndin hevur m.a. arbeitt við at gera ein manual fyri innsavningararbeiðið, sum nú verður royndur í verki.

Endamálið við landsinnsavningini 2019 var at savna pening til neyðhjálparátøk hjá Reyða Krossi. Pengarnir fara til keyp av teppum, tjøldum, reinførispakkum, heilivági og til reint vatn. T.d. røkka kr. 150 til 3.000 litrar av reinum drekkivatni, kr. 200 røkka til tjaldbúðir at verja tvær flóttafólkafamiljur móti regni og vindi, og kr. 500 røkka til mat til 15 hungrað børn í ein mánaða. Partur av landsinnsavningini verður goymdur, soleiðis at Reyði Krossur skjótt kann veita eina hjálpandi hond, eitt nú um farsótt, jarðskjálvti, turkur ella onnur vanlukka brádliga rakar.

## Altjóða hjálpararbeiði

Reyði Krossur Føroya lat í 2019 kr. 4.698.000 til altjóða humaniterar verkætlanir í 10 ymiskum londum. Humaniteru verkætlanirnar høvdu í høvuðsheitunum til endamáls at fremja kropsliga og sálarliga heilsu, útbúgving, ávaringarskipanir fyri veðurlagshóttanir, lívsgrundarlag og aðra neyðhjálp, serliga til kvinnur og børn, ið liva undir serliga viðkvomum korum.

### Nýggir karmar fyri altjóða hjálpararbeiðið hjá RKF

10. januar 2019 undirskrivaðu Jóannes Eidesgaard, formaður í Reyða Krossi Føroya, og Poul Michelsen, uttanríkismálaráðharri, samstarvsavtalu um veiting av altjóða humaniterari hjálp. Samstarvsavtalan inniber millum annað, at landsstýrið letur Reyða Krossi ein part av játtanini til humanitera hjálp.

Við avtaluni fær Reyða Krossur Føroya betur skipað sítt virksemið, sum í mun til landsstýrið ofta hevur fevnt um at taka ímóti og síðani latið víðari pening í sambandi við vanlukkur úti í heimi.

Arbeitt verður miðvíst við at tillaga íverksetanina av samstarvsavtaluni, til tess at tryggja at hjálpin verður veitt bæði skjótt og væl, og í samsvari við samstarvsavtaluna.

Allur stuðulin í 2019 varð latin innanfyri karmarnar av samstarvsavtaluni við Uttanríkis- og Vinnumálaráðið. Tó vóru kr. 4.323.000 latnar frá játtanini frá landsstýrinum, og kr. 375.000 vóru lætnar frá uppsparingum hjá RKF. Neyðhjálpin frá landsstýrinum til Indonesia var latin við ársenda 2018, og var bankaflytingin tí framd fyrst í januar 2019.

## Fundur við leiðsluna í RKíD

Fyrst í februar mánað fekk RKF vitjan av Sven Bak-Jensen, forsetanum fyri RKíD , og Lene Krogh, varaaðalskrivara í danska Reyða Krossi. Gestirnir vitjaðu ymisku virksemisøkini hjá Reyða Krossi Føroya, vóru á sightseeing í Suðurstreymoy, og vóru annars á fundi við nevndina í Reyða Krossi Føroya um framtíðar samstarv millum partarnar innan altjóða humanitera hjálp.

Eisini hittu gestirnir Poul Michelsen, landsstýrismann innan neyð- og menningarhjálp, har tað m.a. varð prátað um nýggju samstarvsavtaluna millum landsstýrið og Reyða Kross Føroya.

## Altjóða starvsfólk hjá Reyða Krossi Føroya

Í samstarvi við RKíD  og sambært *menningarætlanini 2018-2020* virkar RKF fyri at økja um føroyska luttøku í altjóða hjálpararbeiði.

Í november 2019 varð eitt umboð hjá RKF, Vár í Dali, sett í starv á altjóða deildini hjá DRK í Keypmannahavn, fyribils í 1 ár. Sum umboð fyri RKF starvast Vár við at samskipa, íverkseta og leggja hjálpararbeiði til rættis úti í heimi. Arbeiðsstaðurin hjá Vár er í Keypmannahavn, men eftir ætlan skal hon eisini sendast út í heim sum delegatur. Innanfyri karmarnar av samstarvsavtaluni við landsstýrið rindar RKF fyri útbúgving og løn hjá altjóða starvsfólkum.

Eitt starvsfólk var sent út í heim vegna RKF frá 2009-2011. Undir dagførdu altjóða kørmunum hjá RKF frá 2018-2019 er enn einki starvsfólk higartil sent út í heim. Fleiri umsøkjarar hava verið til samrøður í 2019, og 3 hava fingið viðkomandi útbúgvingar í 2018.

## Kunningarátak um altjóða arbeiðið

Avtala var tí gjørd við DRK um rekruttering av starvsfólkum í Føroyum. Lýst verður við leysum størvum í føroysku miðlunum og á heimasíðu og sosialum miðlum hjá RKF.

Harvið verður arbeitt við at skipa fyri kunningartiltøkum á hvørjum ári, har gestarøðarar frá øðrum landsfeløgum vera bodnir á vitjan at greiða frá, hvussu hjálpararbeiðið ítøkiliga gongur fyri seg úti í heimi.

Av tí at DRK skipar altjóða hjálpararbeiðið fyri RKF, gongur sjálv umsóknargongdin umvegis heimasíðuna hjá DRK. Í mars 2019 hevði Bjarke Skaanning, tilbúgvingarstjóri hjá RKíD , fyrilestur í Norðurlandahúsinum. Tiltakið var væl vitjað, við yvir 80 gestum. Jóannes Eidesgaard, formaður í RKF og uttanríkismálaráðharrin, Poul Michelsen, luttóku eisini.

## Kunningarferð

Í samstarvi við RKíD, hevur RKF møguleika at senda eitt umboð um árið á kunningarferð til hjálparverkætlanir úti í heimi. Í sambandi við serlig átøk kunnu fleiri umboð frá RKF sendast.

Endamálið við kunningarferðunum er bæði at førleikamenna umboð hjá RKF, at lýsa við og kunna um altjóða hjálparарbeiðið hjá Reyða Krossi her í Føroyum, og at varpa ljós á altjóða starvsmøguleikarnar hjá Reyða Krossi. Í 2019 umboðaði Kristianna Winther Poulsen Reyða Kross Føroya á kunningarferð til Etiopia.

Kristianna lærdi nógv um hjálparарbeiði hjá Reyða Krossi í Etiopia, og greiddi soleiðis frá ferðini í tíðindabrævi:

*Ein góð vika er liðin, síðani eg kom heimaftur til Føroya eftir eina langa og ógloymandi ferð. Eg fekk mín lívs møguleika at vitja Etiopia við Reyða Krossi, har eg saman við sjálvbodnum frá RKíD fekk høvi at síggja, hvussu hjálparарbeiðið hjá Reyða Krossi í Etiopia gongur fyri seg.*

*Etiopia liggur í landnyrðingspartinum av Afrika og markar til Somalia, Djibouti, Eritrea, Sudan, Suðursudan og Kenya. Við góðum 103 milliónum íbúgvum hevur landið næsthægsta fólkatalið í Afrika, og bert í Nigeria eru fleiri íbúgvar (190 milliónir).*

*Vit flugu umvegis Stokkhólm í sjey og ein hálvan tíma til høvuðsstaðin Addis Ababa, har vit komu tíðliga mánamorgunin 11. november. Vit skuldu beina leið til Reyða Kross-skrivstovuna í býnum, har vit fingu eina hjartaliga móttøku frá okkara starvsfeløgum, og har vit fingu nógv áhugavert at vita um tað arbeiði, sum Reyði Krossur ger í Etiopia. Og har er ov mikið at gera, tí størsta avbjóðingin er tað øgiliga fátækradømið, sum er gerandisdagur fyri óteljandi menniskju. Av teimum 189 londunum í yvirlitinum hjá ST fyri landamenning, er Etiopia land nummar 173.*

*Á ferðini hittu vit nógv fólk, bæði børn og vaksin, sum høvdu fingið ein betri gerandisdag við hjálp og stuðli frá Reyða Krossi. Og ongantíð fari eg at gloyma øll tey deiligu børnini, sum flokkaðust um okkum, allastaðni har vit komu. Vásaklødd og fátækslig, men forvitin og opin royndu tey seg stolt á tí sindrinum av enskum, sum tey dugdu. Tey vildu vera Doctors og Teachers, langt frá arbeiðinum við landbúnaði, sum foreldur teirra og ommur og abbar strevaðust við. Eg vóni so inniliga, at tey koma langt við teirra vøkru barnadreymum um eina bjarta framtíð.*

*Í Etiopia liva stórir partar av fólkinum av landbúnaði og eru sostatt sera bundin at veðri og vindi. Landbúnaðurin ávirkast ógvusliga av vatnflóð, turki og øðrum veðurlagsvanlukkum. Tí er stór óvissa um matvørur, og í 2017 høvdu útivið 8 milliónir menniskju tørv á neyðhjálp.*

*Eftir ein dag í Addis flugu vit til býin Shire norðuri móti markinum til Eritrea. Í tí økinum hevur Reyði Krossur fleiri ymiskar verkætlanir, og vit hittu nógv fólk, sum vóru við í hesum arbeiði, bæði sum hjálparfólk og sum móttakarar av hjálpini.*

*Reyði Krossur veitir einstaklingum stuðul og lán, so tey kunnu opna eina krambúð, eina kaffistovu ella eina vakurleikastovu. Vit hittu bæði kvinnur og menn, sum við stuðli frá Reyða Krossi høvdu keypt neyt, seyð og geitir, sum tey fingu inntøku burturúr. Og vitjaðu eitt tilhald, eitt sokallað 'Safe Space', har fólk kundu koma og í tryggum kørmum vera um dagin, fáa eina mennandi samrøðu og fáa hjálp til at leggja ætlanir um íverksetan og annað, sum kundi gera teirra tilveru betri.*

*Nógv av teimum menniskjunum, vit tosaðu við, vóru sonevnd 'returnees'; tey vóru farin til Saudi Arabia ella Eritrea at finna sær arbeiði, men dreymarnir brustu, og tey komu aftur til heimlandið. Tá vísir tað seg sera trupult at fella til aftur, bæði av fíggjarligum og sosialum ávum, og fleiri tiltøk eru fyri júst hendan bólkin, sum telur nógv fólk.*

*Vit fingu eisini høvi at vitja ferðamál, og í býnum Axum sóu vit borgina hjá sjálvari Drotningini av Saba, sum livdi har fyri 3.000 árum síðani. Í Addis hittu vit ungu kvinnuna Lucy, ið livdi fyri 3,2 milliónum árum síðani. Hon varð funnin í 1974 og nú tysjir ferðafólk til forngripasavnið í høvuðsstaðnum at síggja leivdirnar av hesi ungu kvinnu.*

*Leygarkvøldið 16. november fóru vit aftur í flogfarið og eftir eina drúgva flogferð, hesaferð umvegis Frankfurt, lendu vit í Kastrup sunnumorgunin 17. november. Ein langur og ógloymandi túrur var komin at enda.*

*Søgurnar um øll menniskjuni, vit hittu, og um alt arbeiðið, sum Reyði Krossur ger, eru rørandi og vísa, hvussu stóran týdning hjálpararbeiðið hjá Reyða Krossi hevur. Um tit ynskja at hoyra meira um túrin, haldi eg fegin eina framløgu. Tit gera av, hvussu leingi eg skal tosa, og hvat eg serliga skal leggja áherðslu á. Setið tykkum í samband við Reyða Kross fyri at avtala nærri.*

## Altjóða neyðhjálp

Sum áður nevnt, lat RKF tilsamans kr. 4.698.000 til altjóða humaniterar verkætlanir í 2019. Verkætlanirnar høvdu til endamáls at hjálpa neyðstøddum innan eitt nú heilsutænastur, sálarliga hjálp, tilbúgving, samskifti, stuðul til lívsgrundarlag og útbúgving.

Sum heild gingu verkætlanirnar væl, tó at avbjóðingar til tíðir tóku seg upp, sum gjørdu, at tað var neyðugt við broytingum. Í ávísum førum eydnaðist tað tíverri ikki at røkka upprunaliga málinum, meðan hjálpin í øðrum førum rakk væl longri, enn ætlað.

Bygnaðurin í verkætlanunum var skiftandi frá øki til øki, og tær ymisku hjálparverkætlarnirnar høvdu ymiskar veitingar og tænastur. Hetta saman við teirri sannroynd, at stuðulin frá RKF ikki er oyramerktur til ávísar smálutir í verkætlanunum, ger tað torført at siga nágreiniliga, hvussu nógv menniskju fingu hjálp frá RKF. Tó verður ein meting gjørd av hesum, har kunning og hagtøl loyva tí.

Mett verður, at stuðulin frá RKF tilsamans rakk til áleið 216.400 av heimsins veikastu menniskjum. Serliga vóru tað kvinnur og børn, ið fingu ágóðan av hjálpini, og bæði tænastur og veitingar vóru í stóran mun alneyðugar fyri lív og heilsu hjá móttakarum.

Hetta úrslit er einki minni enn framúrskarandi og hjartanemandi, og eiga øll sjálvboðin, samstarvsfelagar, stuðlar og landsstýrið hjartans tøkk uppiborna.

### Etiopia

Í 2019 lat RKF 600.000 kr. í neyðhjálp til humaniterar verkætlanir í Etiopia. Í Etiopia er fólkaflyting eitt afturvendandi og umstrítt evni. Áhaldandi ófriður, skert frælsi, forfylging og ein kúgandi samfelagsskipan teljast millum orsøkirnar til, at fleiri fólk rýma. Nógvum borgarum tørvar atgongd til grundleggjandi tænastur, útbúgving og arbeiði, og veðurlagsbroytingar og ófriður hava elvt til, at matur á borðið eingin vissa er. Flestu etiopar, sum rýma, søkja útbúgvingarmøguleikar, frælsi og eitt lívsgrundarlag.

Nógvir etiopar eru tó noyddir at venda vónbrotnir heim aftur, eftir at hava verið fyri ágangi so sum harðskapi, svikabrøgdum og ólógligum menniskjahandli í tilflutta landinum. Heimafturkomin møta tey somu avbjóðingum, sum var atvoldin til, at tey upprunaliga fluttu, umframt at tey nú eisini skylda peningin, ið skuldi til fyri at fíggja ferðina. Tey, sum venda heim aftur, vera ofta sæð sum ein byrða hjá familjuni, og tey eru ofta fyri mismuni og møta fordómum.

Reyði Krossur Føroya sendi tí 600.000 kr. til verkætlanina *Assistance and Resilience to Vulnerable Migrants,* sum snýr seg um at stuðla endur-integratiónini hjá teimum, sum venda heim aftur. Reyði Krossur vil styrkja mótstøðuførið hjá teimum, ofta tómhentu, heimvendu, við at bjóða teimum grundleggjandi neyðhjálp (so sum heilsutænastur, teppir,



reinførisútgerð), sálarligan stuðul (ofta ígjøgnum sokallað “Safe Spaces” har tey kunnu fáa hjálp og kunning), og atgongd til arbeiði og fíggjarligan stuðul til at skapa sær eitt lívsgrundarlag (t.d. pening til at stovna egið virki og yrkisútbúgvingar).

Sum heild hevur verkætlanin hepnast sera væl og gongur eftir ætlan, við einans fáum avbjóðingum, so sum seinkingum. Við at leggja dent á bæði sálarligu heilsuna og fíggjarliga lívsgrundarlagið hjá teimum afturvendu, hevur verkætlanin víst seg at vera ein fyrimynd fyri haldgóðari endur-integratión.

Frá tí at verkætlanin byrjaði í september 2017 og til ársenda í 2019 fingu tilsamans 64.132 fólk okkurt slag av stuðli. Einans í 2019 fingu t.d. 225 fólk stuðul til lívsgrundarlag. Ein liður í verkætlanini er eisini at upplæra tey, ið hava fingið hjálp ígjøgnum verkætlanina, til at vera sjálvboðin í Reyða Krossi í Etiopia. Á hendan hátt fara tey heimvendu frá at vera ein byrða í samfelagnum til at vera eitt tilfeingi. Upplæringin fevnir m.a. um fyrstuhjálp, psykososialan stuðul, ósemjuhandfaring og humaniterar meginreglur. Í alt 48 nýggj sjálvboðin hava fingið upplæring í sambandi við hesa verkætlanina í 2019. Mett verður, at tær 600.000 kr. frá RKF røkka til hjálp til áleið 2.950 fólk.

## Indonesia

Í 2019 lat RKF 630.000 kr. í neyðhjálp til humaniterar verkætlanir í Indonesia. Kr. 555.000 vóru sendar innan karmarnar av samstarvsavtaluni við landsstýrið, og RKF sendi kr. 75.000 frá egnum uppsparingum.

Hin 22. desember 2018 rakti ein flóðalda Sunda Strait í Indonesia. Orsøkin til flóðalduna var gosfjallið Anak Krakatoa, ið var farið at goysa. Eldgosið elvdi til skriðulop, sum síðani setti gongd á flóðalduna. Tað var leygarkvøld, og nógv fólk vóru úti og fegnaðust um at hava frí, nú tað nærkaðist ársenda. Eingin ávaring var um flóðalduna, sum sostatt kom púra óvæntað. Harumframt var tað háflóð, tí fullmáni var.




Alt hetta gjørdi, at flóðaldan hevði sera ógvusligar fylgjur. 437 fólk lótu lív, fleiri tíggjutúsund komu til skaða, umframt at hús, gistingarhús, akfør o.a. í túsundatali vóru í sorli. Reyði Krossur Føroya og Uttanríkis- og Vinnumálaráðið lótu í hesum sambandi 630.000 kr. til neyðhjálparátak hjá Reyða Krossi í Indonesia. Neyðhjálparátakið vardi frá 23. desember 2018 til juli 2019. Átakið gekk væl og eftir ætlan. Við fígging úr Føroyum fekk Reyði Krossur í Indonesia hjálpt teimum harðast raktu økjunum við at veita sálarligan stuðul, upplýsa um vanlukku tilbúgving, betra um reinføris- og vatntænastur o.a. Reyði Krossur í Indonesia legði dent á, at nýuppsettu tænasturnar tóku serlig atlit at trygdini hjá kvinnum og børnum. Ítøkiliga rakk hjálpin m.a. til at uppseta tríggjar køkar á staðnum, at hjálpa 215 familjum at finna horvnar familjulimir, at byggja 20 vesi- og reinførisstøðir, at bora tveir vatnbrunnar, at útvega reint vatn til 6.000 fólk, at veita sálarligan stuðul til 2.267 fólk, umframt mangt annað. Tilsamans fingu 18.640 menniskju hjálp ígjøgnum hesa verkætlanina. RKF fíggjaði so at siga alla verkætlanina.

Ítøkiliga hjálpin var framd av sjálvbodnum í Reyða Krossi í Indonesia. Fyri at tryggja, at hjálpin hevði so stóra ávirkan sum møguligt, og fyri at veita vissu fyri at allir áhugapartar fingu kunning um hjálpartænasturnar, samstarvaði Reyði Krossur ígjøgnum alla tilgongdina við lokalu myndugleikarnar.

## Altjóða katastrofutilbúgvingin (DREF)

Hóast smáar og miðalstórar náttúruvanlukkur ofta fremja stórar oyðileggingar kring heimin, er tað tíverri sjáldan, at ljós verður varpað á tær í fjølmiðlunum.

Við lítlum almennum áhuga og vantandi sjónligheit, fáa hesar smáu og miðalstóru vanlukkur ikki neyðugu fíggingina til átøk innan tilbúgvingina. Tað kann síðani hava við sær, at oyðileggingarnar gerast óneyðuga stórar, at fátøk øki gerast upp aftur fátækari, og at neyðin gerst sera stór.

Til tess at stuðla landsfeløgum hjá Reyða Krossi fíggjarliga til at skipa fyrireikandi átøk innan tilbúgving og mótstøðuføri at standa ímóti avleiðingum frá smáum, miðalstórum og stórum vanlukkum, hevur altjóða Reyði Krossur (IFRC) sett á stovn tilbúgvingargrunnin Disaster Relief Emergency Fund (DREF).

DREF bjóðar møguleikar fyri fíggjarligum stuðli í sambandi við bráðfyrireikingar, áðrenn vanlukkur raka, at geva studning til smærri neyðstøður og lán í sambandi við stórvanlukkur.



Í 2018 var nýggja skipanin Forecast based Action (FbA) sett í verk sum stuðulseind til tilbúgvingargrunnin. FbA skipar møguleikar fyri at fíggja sokallaði ávaringarátøk ('early action'), sum við veðurforsøgnum og váðametingum kunnu skipast brádliga, tá stórar náttúruvanlukkur standa og hótta.

Reyði Krossur Føroya lat kr. 500.000 til Tilbúgvingargrunnin hjá Altjóða Reyða Krossi. Tær kr. 500.000 vórðu býttar á DREF átøk hjá RKíD í ávikavist Bahamas (s.32) og í Sýria (s.33).

## Bahamas

Í 2019 lat Reyði Krossur Føroya í fyrstu atløgu 200.000 kr. í neyðhjálp til Bahamas eftir ódnina Dorian. RKíD skipaði fyri DREF átøkum í Bahamas, og tí vóru aðrar kr. 250.000 latnar frá DREF stuðlinum frá RKF.

Hin 1. september 2019 rakti ódnin Dorian Bahamas oyggjarnar. Ódnin herjaði í tvey samdøgur, og oyðileggingarnar vóru ógvusligar. 71 fólk lótu lív, og 45% av øllum húsum á oyggjunum vóru í sorli ella ikki búgvandi í. Sjúkrahúsdeildir, telesamskiftisnetverk, vegir og annað grundleggjandi undirstøðukervi vóru fyri álvarsomum skaða. Hetta hevði við sær, at 73.000 fólk høvdu bráðfeingis tørv á vatni, mati og skjóli.



Altjóða Reyði Krossur, IRFC, stóð fyri víðfevnandi neyðhjálparátaki, ið Reyði Krossur Føroya stuðlaði við 200.000 kr. Neyðhjálparátakið vardi frá september til desember 2019. Fíggingin frá Reyða Krossi Føroya var m.a. við til at veita familjum skjól, neyðug húsarhaldstól so sum telefonir, og neyðhjálparútgerð so sum teppir, mat, vatn og heilsu- og reinførisútgerð. Ein partur av neyðhjálpini var latin sum reiður peningur, soleiðis at fólk sjálvi kunnu gera av, hvørjum tey hava størstan tørv á.

Við fígging frá Reyða Krossi Føroya kundi RKíD eisini senda 11 serfrøðingar til økið. Serfrøðingarnir arbeiddu m.a. við at fáa útgerðarkervið í lag, teir sóu til, at hjálpin kom á rætta

stað, og teir bygdu eina legu, har lokalir og altjóða neyðhjálparserfrøðingar kundu búgva. Peningurin frá Reyða Krossi Føroya var harumframt við til at veita sálarligan stuðul til fólk, soleiðis at tey vóru betri før fyri at handfara skelkandi vanlukkuna, og til børnini var skipað var fyri barnavinarligum økjum, har tey kundu fáa ein skáa.

Tær tilsamans kr. 450.000 frá Reyða Krossi Føroya vóru sostatt við til at hjálpa áleið 700 familjum ella 3000 menniskjum.

## Sýria

Í 2019 lat Reyði Krossur Føroya 600.000 kr. í neyðhjálp til humaniterar verkætlanir í Sýria. Harumframt vóru kr. 250.000 frá DREF verkætlanini brúktar í Sýria.

Í Sýria leikar størsta humanitera kreppan, sum heimurin hevur sæð síðan seinna heimsbardaga, enn á. Kreppan hevur vart í níggju ár, og enn er tørvurin á hjálp sera stórur. 2019 var merkt av vaksandi ófriði, serliga í norðara partinum av landinum, har m.a. 1 mió. íbúgvar úr býnum Idlib eru riknir frá húsi og heimi. Í oktober 2019 tók stríð seg upp við grannalandið Turkaland, ið hevði við sær, at enn fleiri máttu flýggja og sum gjørdi sera stóran skaða á alneyðuga undirstøðukervið, eitt nú heilsuverk, vatnstøðir og skúlar. Flóttafólkalegurnar í økinum eru á tremur. T.d. búgva 73.000 flóttafólk (92% kvinnur og børn) í Al Hom leguni í norður Sýria, ið er ætlað 10.000 fólkum. Vaksandi ófriðurin í 2019 gjørdi støðuna í Sýria enn verri, og tørvurin á neyðhjálp er sera átrokandi.

Reyði Krossur Føroya lat tí 600.000 kr. í neyðhjálp til verkætlanir stýrdar í samstarvi við Reyða Hálvmána í Sýria. Endamálið við verkætlanum var at styrkja mótstøðuførið hjá hart raktu borgarunum í Sýria, við at veita teimum stundisliga heilsu- og verndartænastur, reagera uppá grundleggjandi tørvir, umframt at betra um kropsliga og sálarliga trivnaðin hjá borgarum í ávirkaðu økjunum.



Tíverri eydnaðist tað einans at fáa fatur á 60% av teimum ætlaðu 19,6 mió. kr., sum verkætlanin upprunaliga hevði sett sum mál. Sostatt máttu nakrar ætlanir endurskoðast. Hetta hevði m.a. við sær, at einans ein lítil brotpartur av teimum sjálvbodnu hjá Reyða Hálvmána í Sýria fingu atgongd til ávísa førleikamenning, og at ætlanin at byggja nýggj felagshús mátti strikast.

Hinvegin rakk fíggingin m.a. til at reka 5 læknastøðir, 44.461 borgarar fingu sálarligan stuðul og 3.482 borgarar fingu hjálparpakkar,

sum vóru lagaðir til umstøðurnar og tørvin hjá móttakaranum (í pakkanum eru t.d. heit klæðir, heilsu- og reinførislutir). Reyði Hálvmáni í Sýria hevur serlig sambond (formlig og óformlig), ið verða nýtt til at finna fram til tey veikastu í samfelagnum, sum t.d. børn í hungursneyð, fyri at veita teimum tiltrongdu hjálpina.

Tilsamans 2.613.243 fólk fingu hjálp frá Reyða Hálvmána í sambandi við hesa verkætlanina. Lutfalsliga verður tí mett, at tær kr. 600.000 úr Føroyum hava rokkið út til áleið 183.000 fólk, antin sum hjálpartænastur, neyðhjálparútgerð ella aðrar veitingar.

## Mosambik

Í 2019 lat Reyði Krossur Føroya 500.000 kr. í neyðhjálp til humaniterar verkætlanir í Mosambik.

Í mars 2019 herjaði ógvusliga melduródnin Idai í Mosambik. Ódnin og avfallið, ið kom í kjalarvørrinum á ódnini, hava framt stóran skaða á bygningar, undirstøðukervið, grøði o.a. Mett er, at Idai ávirkaði á leið 1,5 mió. borgarar í Mosambik, harav minst 500 lótu lív, og óteljandi vóru rikin frá húsi og heimi.

Reyði Krossur Føroya sendi í hesum sambandi 500.000 kr. til neyðhjálparátøk hjá Reyða Krossi í Mosambik. Endamálið við átøkunum var at veita heilsutænastur, reint drekkivatn og skjól til tey mongu menniskjuni í hart raktu økjunum.



Við fígging frá Reyða Krossi Føroya, kundi Reyði Krossur í Danmark senda serfrøðingar innan m.a. logistikk og psykososialan stuðul til Mosambik. Serfrøðingarnir úr Danmark arbeiddu saman við sjálvbodnum frá Reyða Krossi í Mosambik fyri at finna fram til tey, sum høvdu størstan tørvin. Í neyðhjálparpakkunum, sum vórðu útflýggjaðir, vóru eitt nú presendingar, amboð, teppi, mýggjabitanet, húsarhaldstól, reinførisútgerð og tablettir til at reinsa vatnið.

Tilsamans fingu 135.055 borgarar neyðhjálparvøru frá Reyða Krossi í Danmark. Harumframt sendi Reyði Krossur í Danmark ein serfrøðing í psykososialum stuðli, sum upplærdi sjálvboðin hjá Reyða Krossi í Mosambik at handfara sálarligu fylgjurnar av vanlukkuni, og ein serfrøðing innan kyn og verju (Protection, Gender and Inclusion), sum skuldi tryggja, at atlit vórðu tikin at serligum tørvi á verju, kynsbundnum trupulleikum, og inklusjón av øllum bólkum uttan mun til tilknýti. Serligur dentur varð lagdur á at verja børn, sum eru serliga

sárbær í eini vanlukku. Tíverri ber als ikki til at meta um, hvussu nógv menniskju fingu hjálp júst frá RKF.

## Libanon

Libanon er landafrøðiliga lítið samborið við onnur lond í miðeystri, men hýsir tó fleiri enn 1,5 mió. sýriskum flóttafólkum. Harumframt hevur Libanon í fleiri ár hýst hundraðtúsundtals palestinskum flóttafólkum. Libanon hevur sostatt tað hægsta talið av flóttafólkum fyri hvønn íbúgva í heiminum. RKF sendi kr. 500.000 í neyðhjálp til Libanon í 2019.

Stóri hópurin av sýriskum flóttafólki hevur lagt aftur størri trýst á almennu tænastuskipanina, sum longu frammanundan var veik. Økini, har flóttafólkalegurnar liggja, eru ógvuliga fátøk og hava ikki neyðugar grundleggjandi hentleikar. Familjur eru ofta noyddar at taka ómøguligar avgerðir – ímillum at brúka tann avmarkaða peningin tey eiga til mat ella lækna.



Nógvar familjur hava heldur ikki ráð at endurnýggja skrásetingina fyri flóttafólk, og liva tí sum *statsleys*, og hava sostatt ikki atgongd til arbeiði og almennar tænastur. Harafturat leiðir henda sera drúgva kreppan (*protracted crisis*) til vaksandi spenning ímillum vertssamfelagið og flóttafólk. Slíkar avbjóðingar hava við sær, at sálarliga heilsan hjá bæði flóttafólkum og hjá libanesum versnar.

RKF sendi tí kr. 500.000 til verkætlanina *Lebanon PSS1 Project,* ið virkar fyri at veita psyko-sosialan stuðul (PSS). Endamálið við verkætlanini er at betra um sálarligu heilsuna hjá flóttafólki og vertssamfelagnum, og við at fyrireika og stuðla starvsfólkum og sjálvbodnum, sum arbeiða í økinum.

Yvirskipað eydnaðist verkætlanin fyri 2019 væl, tó at ikki allar upprunaligu ætlanirnar vórðu gjøgnumførdar vegna starvsfólkatrot. Eitt nú hevði verkætlanin sum mál at gera 75 PSS økisrfrágreiðingar, og veita upplýsingar um PSS støðuna, men tíverri eydnaðist tað einans at røkka 60. Eisini miseydnaðist tað at seta ávís átøk í verk, vegna trot á starvsfólki, og tí at uppgávurnar gjørdust ov rúgvismiklar og krevjandi.

Tó fingu áleið 91 starvsfólk og sjálvboðin fyri Reyða Kross í Libanon upplæring í PSS, sum eru 11 fleiri enn ætlað, og mett verður, at áleið 35.555 menniskju fingu hjálp innan eitt nú PSS, tilbúgving og annan stuðul. Lutfalsliga verður mett, at RKF hjálpti áleið 4700 menniskjum. Uppfylging krevst vegna spentu gongdina í Libanon, og tí er tað umráðandi, at Reyði Krossur framvegis hevur ein støðugan leiklut í økinum.

## Bangladesh

Í 2019 lat Reyði Krossur Føroya 400.000 kr. í neyðhjálp til humaniterar verkætlanir í Bangladesh. Tá stríð brast á í Rakhine statinum í Myanmar í 2017, elvdi tað til eina av størstu humaniteru kreppunum í nýggjari tíð. Síðani tá eru yvir 900.000 fólk flýggjað til landspartin Cox Bazar í Bangladesh. Hesi løgdust afturat teimum fleiri enn 2 mió. íbúgvunum, sum longu búðu í Cox Bazar, ið telist millum tey fátækastu og viðkvæmastu økini í Bangladesh.

Fátæksligu korini í flóttafólkalegunum gera, at støðan hjá ungum gentum er serliga hættislig, og tær eru í vanda fyri at vera fyri kynsligum ágangi, barnaarbeiði, harðskapi, vantandi heilsutænastum og útbúgving, ólógligum menniskjahandli og at gerast barnabrúðrar.

Reyði Krossur Føroya sendi tí kr. 400.000 til verkætlanina *Hope and Safety for Adolescent Girls*, ið virkar fyri at betra um tryggleika, trivnað og sálarligu heilsuna, serliga hjá ungum gentum í aldrinum 12-18 ár, men eisini hjá børnum yvirhøvur. Endamálið við verkætlanini er at verja børn og ung, og samstundis upplýsa tey og styrkja teirra førleikar at taka avgerðir, sum hava eina jaliga ávirkan á teirra lívsleið. Hetta var framt í verki við at veita psykososialan stuðul í einum tryggum og eggjandi umhvørvi, veita upplæring í yrkisdeplum, og við at førleikamenna starvsfólk og sjálvboðin hjá Reyða Hálvmána í Bangladesh.



Yvirskipað eydnaðist verkætlanin í 2019 væl, har fleiri fólk enn upprunaliga væntað fingu hjálp. 51 starvsfólk og sjálvboðin hjá Reyða Hálvmána í Bangladesh fingu upplæring í psykososialum stuðli og friðarligari ósemjuhandfaring/harðskapsfyribyrging. Verkætlanin hevði sum mál at røkka 875 gentum ímillum 12 og 18 ár, men tíverri eydnaðist tað einans at røkka 416 í hesum málbólkinum. Orsøkin var, at tað tók longri tíð enn væntað at samskipa hjálpina á ein hátt, sum skuldi tryggja, at tænastan hevur burðardygg framtíðarútlit. Tískil byrjaði arbeiðið við ungum gentum seinni enn upprunaliga ætlað. Hinvegin fingu 9.022 børn í aldursbólkinum 6-11 ár hjálp, og tað er væl fleiri enn tey 5.175, sum var tað talið av børnum, ið upprunaliga varð ætlað at røkka. Ætlað var eisini at seta ein yrkismiðdepil á stovn, men hetta bleiv av ongum, av tí at stjórnin í Bangladesh ikki gevur loyvi at stovna yrkismiðdeplar til frama fyri fólk, ið stava frá Rakhine í Myanmar. Kortini eydnaðist tað at stovna sjey virkisførar yrkisdeplar. Verkætlanin hevur eina haldgóða innbygda exit strategi, tí við at upplæra sjálvboðin úr leguni, til dømis í at veita psykososialan stuðul, verða hesir førleikarnir verandi í leguni.

Tær 400.000 kr. frá Reyða Krossi Føroya svara til at hjálp til á leið 1.200 fólk.

## Malavi

Í 2019 lat Reyði Krossur Føroya 200.000 kr. í humaniterari hjálp til verkætlanir í Malavi.

Í Malavi, sum telist millum heimsins fátækastu lond, uppliva tey á hvørjum ári ógvusligar náttúruvanlukkur, so sum vatnflóð og skerping. Í mars í 2019 herjaði herviliga melduródnin Idai Malavi, Mosambik og Simbabvi. Hetta førdi til ógvusligar vatnflóðir, ið ávirkaðu á leið 923.000 menniskju í Malavi, har meir enn 125.000 vóru rikin frá hús og heimi.

Reyði Krossur sendi í hesum sambandi 200.000 kr. til neyðhjálparátøk hjá Reyða Krossi í Malavi. Endamálið við átøkunum var at hjálpa fólki í hart raktu økjunum at endurstovna teirra lívsgrundarlag, við at veita skjól, mat á borðið, heilsu- og reinføristænastur og við at kunna um vanlukkutilbúgvingar. Verkætlanin hevur, sum heild, gingið væl, hóast nakrar avbjóðingar gjørdu, at summi mál hava verið seinkað.

Arbeiðið at veita skjól og mat á borðið til hart raktu økini hevur gingið eftir ætlan. Ítøkiliga kann nevnast, at 98 av teimum ætlaðu 100 húskjunum hava fingið varandi skjól. Her var serliga hugsað um at húsa teimum, ið høvdu trupult við at útvega sær skjól sjálvi (t.d. einkjur, einligir uppihaldarar, eldri og óarbeiðsfør). 2.000 húskir hava fingið reiðan pening (tríggjar upphæddir latnar yvir tríggjar mánaðir), sum aloftast vóru brúktar til mat og umvælingar. 2.000 húskir hava fingið ískoyti til landbúnað (t.d. fræ, amboð, kríatúr).



Fyri at minka um sjúku og deyða av ringum vatn- og kloakkviðurskiftum, setti verkætlanin sum mál at byggja nýggj vesi í 24 skúlum, at umvæla gomul og óskikkað vesi, at bora vatnbrunnar fyri at tryggja drekkandi vatn, umframt at útbúgva 25 heilsunevndir í reinførisvanum, sum tey síðan kunnu læra onnur. Arbeiðið at bora brunnarnar og byggja nýggju vesini hevur verið nakað seinkað orsakað av regntíð og torførari atgongd til staðið, men er í løtuni í gongd.

Tíverri eru nakrar ætlanir fyribils útsettar, vegna vantandi fígging. Ætlað varð m.a. at kanna 11.788 børn fyri føðslutrot, men higartil eru einans 4.307 kannaði. Harumframt er ætlanin um at undirvísa fólki í vandaøkjunum um vanlukku tilbúgvingar eisini fyribils útsett, vegna vantandi fígging.
Tilsamans fingu áleið 16.000 menniskju hjálp við eitt nú reinføri, smábarnaheilsu, hýsing og tilbúgving. Harumframt fingu áleið 80.000 atgongd til betri vatnveitingar og áleið 140.000 atgongd til ves. Verkætlanin er fjøltáttað og samansett, og tær ymisku fjølbroyttu tænasturnar

veitingarnar hava skiftandi kostnað, og tíverri ber ikki til at meta um, hvussu nógv menniskju fingu ágóðan av stuðlinum frá RKF til hesa verkætlan.

## Suður Sudan

Í 2019 lat Reyði Krossur Føroya 500.000 kr. í humaniterari hjálp til verkætlanir í Suður Sudan, har støðan er serliga hættislig. Bæði vápnað stríð og búskaparkreppa gera um seg í landinum. Serstakliga hevur tað verið vápnaða stríðið í Suður Sudan, ið hevur trýst familjur út á mýrulendi, burtur frá hernaligum økjum. Tískil er trygdarstøðan í Suður Sudan framvegis sera spent, og m.a. er deyðstalið millum vanligar borgarar høgt, hungursneyð er í landinum og famljur eru sundurskildar av ófriði.



Harumframt hevur búskaparkreppa havt stórar avleiðingar fyri lívsgrundarlagið og gerandisdagin hjá vanligum borgarum. Endamálið við verkætlanini hjá Reyða Krossi í Suður Sudan 2019, er at minka um kreppustøðuna í landinum, við veita humanitera hjálp til fólkið í Suður Sudan. Tískil hevur Reyði Krossur Danmark/Føroyar saman við Reyða Krossi í Suður Sudan (RKSS) arbeitt tætt saman um at veita humanitera neyðhjálp í lokalsamfeløgunum serliga Bentiu, Bor og Malakal, men eisini í øðrum landspørtum, sum hava tørv á bráðfeingis hjálp. At stuðla lokalsamfeløgum í Suður Sudan hevur verið gjørt við at førleikamenna sjálvboðin og við at tryggja sjálvbjargni. Hetta ger eisini, at fólkið í Suður Sudan verður minni bundið at hjálp uttanífrá. Tó er tað ein stór avbjóðing at fáa neyðhjálpina fram á rætta stað vegna ótryggleika og spentu støðuna í landinum.

Samanlagt lat Reyði Krossur Føroyar 518.000 kr. til verkætlanina *South Sudan HUM Early Action and Response*, og yvirskipað eydnaðist verkætlanin væl. Verkætlanin hevði sum mál at veita humanitera hjálp til 9000 sudanskar borgarar, sum vóru rakt av sjúku, vápnaða stríðnum og náttúrvanlukkum. Her eydnaðist tað Reyða Krossi at røkka 15.000 borgarum í Suður Sudan, sum eru 6.000 fleiri enn ætlað. Eisini fingu 55 sjálvboðin hjá RKSS upplæring at fyribyrgja umfarssjúkuni kolera. Harumframt megnaði Reyði Krossur at veita heilivág og heilsuráðgeving til 38.400 sudanskar borgarar. Reyði Krossur arbeiðir áhaldandi við at veita umráðandi neyðhjálp til Suður Sudan, men spenta støðan og vápnaða stríðið í landinum ger tað torført at fáa neyðhjálpina fram á rætta stað. Tó hava friðarsamráðingar verið millum partarnar í Suður Sudan síðan 2018. Men hesar geva onga vissu um frið í landinum. Støðug uppfylging krevst, og tí er tað umráðandi, at Reyði Krossur framhaldi er virkin í Suður Sudan.

Tær 518.000 kr. frá Reyða Krossi Føroya svara til at hjálpa á leið 3.000 fólk. Neyðhjálpin varð latin borgarum, ið vórðu beinleiðis rakt av kreppustøðuni í landinum, til dømis við at veita heilsuráðgeving og ráðgeving í at fyribyrgja umfarssjúkum.

## Barnalandið í Malavi

Í 2019 lat Reyði Krossur Føroya 50.000 kr. til Barnalandið í Malavi.

Malavi telist millum heimsins fátækastu og minst framkomnu lond. Harafturat liggur Malavi í einum ábærum øki, har tey á hvørjum ári uppliva náttúruvanlukkur so sum flóð og skerping. Hetta hevur við sær, at mong hava trupult við at breyðføða sær. Børn, ung og kvinnur eru serliga sárbærir bólkar í Malavi. Tað eru nógv foreldraleys børn í Malavi, sum antin hava mist annað ella bæði foreldrini, og liva í stórum fátækradømi.

Reyði Krossur Føroyar sendir 50.000 kr. til Reyða Kross í Malavi, í sambandi við verkætlanina Barnalandið í Malavi, ið arbeiðir við at styrkja mótstøðuførið hjá børnum, ungum og kvinnum. Ein partur av hesari játtanini er oyramerktur til Barnalandið í Malavi frá privatum gevarum, og ein partur er latin av Reyða Krossi Føroya.

Barnalandið hjá Reyða Krossi hjálpir hesum sárbæru bólkunum, sum t.d. foreldraleysum og útsettum børnum, við at bøta um lívstreytir teirra og tryggjar teimum eina betri framtíð. Arbeitt verður við at upplýsa um heilsu, reinføri og fyribyrging, at tryggja atgongd til reint vatn, at betra um vesi- og kloakkviðurskifti, at útbúgva ávís fólk um vanlukkutilbúgvingar og ávaringarskipanir. Harumframt leggur verkætlanin seg eftir at taka hond um tey veikastu í samfelagnum við at skúla og stuðla teimum, at bjóða barnaansing, mammubólkar og við ungdómsarbeiði. Verkætlanin í 2019 hevur gingið sum ætlað og kann sigast at vera væleydnað.